# Eingin fólkavøkstur, hóast arbeiði er til allar hendur

**Við árslok 2001 átti Nes kommuna slakar 12 milj. krónur á bók. Hetta eru slakar 7 milj. krónur meira enn við ársbyrjan 2001. Vøksturin stavar frá størri skattainntøku og minni nýtslu**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Vilmund Jacobsen*



*Nes kommuna er væl fyri fíggjarliga, og arbeiði er til allar hendur. Nógv virksemi er á økinum millum Oyrarnar og Kassamiðstøðina.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Nakað herfyri fingu borgararnir í Nes kommunu ársroknskapin hjá kommununi fyri 2001 bornan á dyrnar. Við roknskapinum fylgdi eisini ein sonevnd formansfrágreiðing, sum vit fara at hyggja niður í.

Í frágreiðingini ásannar bygdaráðið, at árið 2001var eitt gott ár fyri kommununa; virksemið var stórt, og arbeiðsloysið minkaði niður í einki. Somuleiðis vóru skattainntøkurnar størri enn mett.

Skattainntøkan hjá Nes kommunu í 2001 var 26 milj. krónur ella heilar 5 milj. krónur meira enn mett. Skattaprosentið var 19,9%, bæði í fjør og árið fyri, so økingin stendst av øktari inntøku hjá borgarum og partafeløgum.

Kommunan hevði eisini aðrar rakstrarinntøkur í 2001, eitt nú frá dagrøktini, havnini og svimjihylinum. Hesar vóru stívliga 2,9 milj. krónur í mun til metta talið, sum var slakar 2,3 milj. krónur.

Tá ið samanum kom, vóru samlaðu útreiðslurnar hjá kommununi minni enn mett í fíggjarætlanini fyri 2001, og hetta stavar partvís frá heldur minni aktiviteti á ymiskum økjum enn upprunaliga ætlað.

Við árslok 2001 átti Nes kommuna slakar 12 milj. krónur á bók. Hetta eru slakar 7 milj. krónur meira enn við ársbyrjan 2001. Vøksturin stavar frá størri skattainntøku og sum nevnt eisini minni nýtslu.

### Fólkatal og búseting

Hóast positivu gongdina og góðu útlitini hjá kommununi - við ongum arbeiðsloysi, sterkum vinnulívi, ongari skuld og nógvum miljónum á bók - vaks fólkatalið tó lítið og einki í 2001. Við ársbyrjan búðu 1166 fólk í kommununi og 1169 við árslok 2001. 57 fólk fluttu til kommununa, harav 26 fólk úr útlandinum. 18 børn vórðu fødd. Á hinari síðuni fluttu 70 fólk úr kommununi og tvey fólk doyðu í 2001. Hetta gevur ein fólkavøkstur uppá trý fólk.

Men fólkavøksturin í Nes kommunu hevur tó verið størri okkurt árið, tí í frágreiðingini sigur kommunan, at "fólkavøksturin hesi seinastu árini hevur havt við sær, at í dag er so gott sum fólk í øllum húsum. Haraftrat vórðu nøkur hús bygd í 2001, og onnur vóru í gerð.

Kommunan sigur, at eftirspurningurin eftir grundstykkjum er vaksandi, og kommunan hevur fleiri umsóknir liggjandi um grundstykkir í útstykkingini millum Gadd og Kvíggjarheygg. Hetta er samstundis eisini einasta øki, sum kommunan kann vísa fólki á, sum vilja seta búgv.

Annars arbeiðir Nes kommuna eisini við nýggjum útstykkingum Undir Nesinum.

# Alneyðugt er at útbyggja skúlan



*Við árslok 2001 var talið av skúlabørnum í Nes kommunu 203. Seinastu fýra árini hevur kommunan sett stívliga 11 milj. krónur av til skúlabygging. Niðanfyri og innanfyri skúlan verður økið eisini gjørt byggibúgvið til eldrasambýli.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen.*

**Grundstykkið til eldrasambýli verður nú gjørt byggibúgvið niðanfyri og innanfyri skúlan**

KOMMUNUMÁL
*Vilmund Jacobsen*

Longu fyri tíggju árum síðan hevði Nes kommuna ítøkiligar ætlanir um, hvussu skúlin á Toftum skuldi byggjast út, men kreppan, sum reið um alt samfelagið tá, førdi til, at hesar ætlanir vórðu lagdar til síðis.

Soleiðis sigur kommunan í sonevndu formansfrágreiðingini til roknskapin fyri 2001, sum borin varð í hvørt hús í Nes kommunu herfyri.

Lagt verður aftrat, at bygdaráðið arbeiðir nú aftur við at fyrireika skúlaútbygging, sum mett verður at vera alneyðug.

Á fíggjarætlanini fyri 1999 vóru 2 milj. krónur settar av, 3 milj. krónur í 2000 og 3,5 milj. krónur í 2001. Í ár eru 2,7 milj. krónur settar av. Hetta gevur stívliga 11 milj. krónur yvir fýra ár.

Við árslok 2001 var skúlabarnatalið í Nes kommunu 203.

### Undir bygging í ár

Í frágreiðingini verður eisini víst á, at tørvurin á røktarplássum til tey gomlu og veiku økist støðugt.

Saman við hinum kommununum í oynni, eigur Nes kommuna Eysturoyar Ellis- og Røktarheim og Umlættingarheimið í Gøtu. Aftrat hesum verður Vistarheimið í Runavík brúkt, og nøkur fólk í kommununi hava eisini verið til umlætting í kommunalum sambýlum aðrastaðni.

Nú verður so arbeitt við at fyrireika bygging av einum eldrasambýli í Tøvuni á Toftum.

Grundstykkið verður gjørt byggibúgvið, og Nes kommuna miðjar eftir at fara undir sjálva byggingina í hesum árinum.

## Neyðugt er at pumpa

KOMMUNUMÁL
*Vilmund Jacobsen*

Í samráð við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna verða regluligar vatnroyndir tiknar av vatninum í Nes kommunu. Hetta verður gjørt fyrst í hvørjum mánaði, og fáa virkini tá fráboðan um úrslitið.

Í formansfrágreiðingini til roknskapin fyri 2001, sigur kommunan, at royndirnar hetta árið vístu, at dygdin á vatninum er góð.

Kommunan arbeiðir tó støðugt við at betra um dygdina, soleiðis at vatnið fær best hóskandi pH-virði, sum tað eitur. Ein liður í hesum er, at eitt doseringsanlegg er sett upp í reinsiverkinum. Aftrat hesum eru nýggj reinsifiltur og strálianlegg sett upp, sum tilsamans merkja, at reinsiorkan er tvífaldað.

Hóast vatngoymsl-urnar eru stórar, sigur kommunan, at vatnnýtslan er økt so mikið, at neyðugt er at pumpa vatn úr Toftavatni um summarið. Hetta kostar 1 krónu fyri hvønn rúmmetur av vatni, og tí mælir kommunan øllum til at ansa eftir vatnnýtsluni.



# Fólkatónleikarar tulka J.C. Svabo

**Fimm fólkatónleikarar úr Englandi og Danmark geva í dag út fløguna "Færd" við tónleiki, sum millum annað tekur støði í varðveitta nótasavninum hjá J. C. Svabo.**

FLØGUÚTGÁVA
*Rúnar Reistrup*




Í 1928 varð eitt nótasavn eftir Jens Christian Svabo funnið á loftinum í Pæsastovu í Havn, har Svabo búði seinastu nógvu árini av lívi sínum. Savnið verður mett at stava frá umleið 1775.

Í dag verður ein fløga útgivin, sum í stóran mun tekur støði í hesum nótasavni.

Tað eru fimm fólkatónleikarar, tveir úr Englandi og tríggir úr Danmark, sum hava tikið stig til fløguútgávuna, sum verður nevnd "Færd". Heitið vísir til temaið hjá fløguni, ið er æviga ferðin hjá tónleikinum frá landi til lands og frá manni til manns.

Á fløguni eru nútímans tulkingar av eldri løgum, sum bera dám av at hava ferðast millum lond og fólk. Eftir at hava spælt burturúr nótasavni Svabos, meta fólkatónleikararnir handan fløguna tað verða týðuligt, at J.C. Svabo hevur fingið tónleikaligan íblástur á ferð síni í Onglandi í 1775.

Hini løgini á fløguni eru danskar vísur, sum hava verið brúktar í dansi av føroyingum, og sdum soleiðis eisini hava fingið dám av at ferðast.

### Konsertir kring landið

Fløgan "Færd" verður útgivin í Føroyum í morgin í sambandi við at fýra av teimum fimm tónleikarunum á fløguni eru í Føroyum í løtuni, her tey skulu spæla konsertir fleiri staðni í landinum. Í komandi mánað verður fløgan givin út í Danmark.

Tað eru Karen Tweed og Ian Carr úr Englandi, og Peter Uhrbrandt, Eskil Romme og Nana Lüders úr Danmark, sum framføra løgini á fløguni.

# Fiskavirking á Tvøroyri leggur ikki stilt

**Hóast hetta er hásesong fyri svartkalva, er lítið at fáa í løtuni.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á Fiskavirking á Tvøroyri verður ikki lagt stilt í summar. Har fara tey at arbeiða hvørja viku uttan steðg nú í summar. Tað merkir tó sjálvandi ikki, at fólk ikki sleppa í summarfrí.

Sum skilst, er tað serliga svartkalvin sum ger, at virkið ikki leggur stilt. Hetta er - eftir hvat kønir siga - hásesong fyri svartkalva, men í løtuni er lítið at fáa.

Garnaskipið, Váðasteinur, landaði 13.400 pund av svartkalva týsdagin, og tað er ein lítil túrur í mun til árstíðina.

Sagt verður, at yvirhøvur lítil svartkalvi er at fáa í løtuni, men vónað verður, at fiskiskapurin fer at taka seg uppaftur, nú tíðin skuldi verið góð.

### Tríggir trolarar

Mánadagin landaði lemmatrolarin, Vesturskin, 180.000 pund á Tvøroyri. Meginparturin av veiðini var góður upsi.

Á Tvøroyri siga tey, at størsti parturin av veiðini hjá trolaranum var upsi 3. Nakað var eisini av upsa 2 og upsa 4, men sum heild var slagið betur, enn tað hevur verið í seinastuni.

Í dag landa Vestmenningur og Fram á Tvøroyri, men tá ið vit frættu haðani fyrrapartin í gjár, var ikki greitt, hvussu nógv skipini høvdu inni.

